MIÐVÁGS-SANDAVÁGS SKÚLI



# Lærarastarv

## í Miðvágs-Sandavágs skúla

**Í Miðvágs-Sandavágs skúlaverki er starvið sum avloysari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi leyst at søkja.**

**Starvið er 24 t/v og fyribils ætlað til tíðarskeiðið 21. mai til 30. juni 2008**

**Vit søkja eftir lærara, sum**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við starvsfelagarnar á skúlanum kunnu undirvísa og taka lut í dagliga virksemi skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- eru fúsur at taka við avbjóðingum og broytingum, sum kunnu menna og skapa virðing fyri skúlanum
- seta ein heiður í at vera stundisligur og nærlagdur

**Umsøkjarar skulu hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum**

- týskt í 8. flokki
- danskt í 5. flokki
- hondarbeiði í 7. flokki
- gentu- og dreingjaítrótt og svimjing í 3., 4. , 5. og 6. flokki
- heimkunnleika í 4. og 9. flokki

**Førleikakrøv:**
Lærarаútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi, c.v. og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum **í hendi í seinasta lagi leygardagin 10. mai 2008 kl. 16.**

Nærri fæst at vita um starvið frá Hans Jørgensen, skúlastjóra, ella Árna Jacobsen, varaskúlastjóra. Telefon 33 28 20 ella 21 88 20. Teldupostur mss@skulin.fo.

# Elektrikkari søkist!

Vegna økt virksemi, verður søkt eftir einum elektrikkara til fjølbroytt el-arbeiði v.m. Má kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Koyrikort til bil krevst.

Áhugaðir kunnu ringja ella senda okkum ein teldupost!

EINAR MIKKELSEN Sp/f

Bøgøta 12 · Postboks 321 · 110 Tórshavn
tel 31 22 11 · el-mikk@post.olivant.fo

VESTMANNA KOMMUNA

# UMSJÓNARFÓLK

Hervið verður søkt eftir umsjónarfólki til dagstovnarnar og eldrasambýlið hjá kommununi.

**Arbeiðsuppgávur**
At hava um hendi dagligu umsitingina av dagstovnunum og eldrasambýlinum.

Umhvørvið uttan um bygningarnar er ein sjálvsagdur partur av arbeiðinum.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir einum fyrikomandi fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt, men sum eisini kann átaka sær aðrar arbeiðsuppgávur, enn tær lýstu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til teknisku deild.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru við avvarandi yrkisfelag ella eftir avtalu.

Staðið verður sett frá 4. august 2008 at rokna.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 470110.

Umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Vestmanna Kommunu, Bakkavegur 16, 350 Vestmanna.

Umsóknin skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 19. mai 2008, kl. 1200.

Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

**Vestmanna Kommuna**

# Kunngerð um rudding

Fuglafjarðar kommuna hevur sett sær fyri, at bilvrak, akfør, bingjur og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu verða beind burtur og latin góðkendum móttakara.

Sambært § 1 í umhvørvislógini og § 1, stk. 4 í náttúrufriðingarlógini er ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttanduraøki, og í § 10 um burturkast stendur, at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Í § 61 í ferðslulógini stendur, at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan **15. mai 2008**, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

**Fuglafjarðar Kommuna og Sýslumaðurin**



# Hús á Tvøroyri

Nýggj hús á Sevmýru, Spógvavegur 21, á Tvøroyri, til sølu.

Húsini eru 4 ára gomul, í tveimum hæddum umframt ovasta loft.:

**Ovara hæddin:**
Køkur, stova, 3 kømur umframt hjúnarrúm, stórt baðiverilsi, gangur og trappurúm til kjallaran.

**Kjallari:**
Stoyptur og bjálvaður. Annars óinnrættaður.

Húsini eru í góðum standi.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar um húsini og møguleikan at síggja hesi fáast við at venda sær til okkara

Advokatarnir Hentze

DEMMUS HENTZE — landsrættarsakførari
TURIÐ DEBES HENTZE — advokatur og mediator m.m.c.r.

Tórsgøta 17 · Postboks 236 · FR 110 Tórshavn
Tlf. 311460 · Telefaks 311490 · E-mail: hentze@hentze.fo
www. hentze.fo



# Eigaraíbúð í hjartanum í Havnini til sølu

Sera snotilig eigaraíbúð í nýbygningi í M. Heinasonargøtu 13, Tórshavn, til sølu.

Íbúðin sum er á 1. hædd, er 54 m² til víddar og liggur í fjálgum og veðurgóðum umhvørvi mitt í Havnini.

Vælhóskandi til einstakling ella 2 persónar og fevnir búrúmið um køk og uppihaldsrúm í einum, umframt sovikamar og wc/brúsurúm. Herumframt er felags trappuuppgongd, 21 m² og vaskirúm til víddar 15 m².

Advokatarnir Hentze

DEMMUS HENTZE — landsrættarsakførari
TURIÐ DEBES HENTZE — advokatur og mediator m.m.c.r.

Tórsgøta 17 · Postboks 236 · FR 110 Tórshavn
Tlf. 311460 · Telefaks 311490 · E-mail: hentze@hentze.fo
www. hentze.fo